# Orðbragd og umrøða

**Í eini framtíð, ið fyri alt skal vera rationell, er málsligt fjølbroytni meir til bága enn nyttu. Eftir hesi fatan eiga mál, eisini føroyskt sjálvandi, at verða javnað til eitt altjóða og marknaðarskilligt nýmál**

**(Seinni partur)**



## Hugleiðing



**Carl Jóhan Jensen**

### Afturhaldið

Var orðbragdið hjá føroyskum tjóðskaparfólki merkt av stjórnmálarembingum í Danmark, var tað tað ikki minni hjá teimum, ið stóðu ímóti tjóðskaparrákinum í almennu umrøðuni og tað var eingin hissini mótstøða – at kalla alt tað danska valdið í Føroyum verðsligt sum andligt.

Sum dømi um orðbragdið hjá mótstøðuni fari eg her at taka fram tvær greinar eftir Emil Bruun, Havnarprest. Greinarnar stóðu í *Færøske Kirketidende,* onnur í februar í 1891, hin í september 1894. Í fyrru greinini er Emil Bruun føroyskum máli upp á seg góðviljaður. Hann heldur, at føroyskt saktans kann stimbrað tað andliga lívið hjá almúguni og vera til stóra veking, sum hann málber seg. Kortini ivast hann í, um føroyskt evnar at gerast kirkjumál. Eitt kirkjumálsskifti er eitt alt ov mikið stórt tak, heldur hann, og forðingarnar so nógvar, tað stígist ikki yvir tær.

Í seinnu greinini er allur góðvilji útkólnaður í Havnarpresti. Við tilvísing til søguna um málruðuleikan í Babel, vil Emil Bruun nú við kronglutum guðfrøðiligum grundgevingum vísa, at tað er ókristiligt at krevja føroyskum rætt innan kirkjugátt. Tjóðskaparligur ymiskleiki kyknar úr syndini, sigur hann. Rættur kristindómur er yvir øllum tjóðskaparmuni.

Yvirhøvur kann sigast, at orðbragdið hjá Havnarpresti er eyðkent fyri mótstøðuna móti føroyskum kirkju- og skúlamáli hesi árini og minnir ikki sørt um tær próvgrundir, sum afturhaldið fyrr á øldini hevði brúkt víðahvar um Evropa til at beita frá sær krøv um borgarlig rættindi, eitt nú talufrælsi, trúarfrælsi, javnstøðu fyri lógini o.s.fr. Seinni fyrst í tjúgundu øld, tá ið fakfelagsrørslan fekk høvdið fyri seg, vóru somu próvgrundir havdar á lofti aftur, hesa ferð til at røkja krøv av um búskaparlig og sosial rættindi.

Hesar próvgrundir eru eitt trísligið reip.

Fyrsti táttur er grundsetningurin um nyttuloysi. Hóast tað, ið stevnt verður ímóti, kann vera bæði tiltrongt og rímiligt, enntá virðingarvert, er tað alt tað sama til fánýtis, ein viðfáningur bara.

Annar táttur er grundsetningurin um øvuta ávirkan. Hann sigur, at hvussu víkir og vendir endar øll umbótarstevna illa. Umbøtur hava ta natúr, at úrslitið av teimum javnan er tað øvuta av tí, sum ætlað var.

Triði tátturin er grundsetningurin um skaðasemi. Tað eru óráð at broyta, hvør ið so broytingin er, einskærað skilaloysi.

Hetta trísligna orðbragdsreipið er tað, Emil Bruun lesir seg eftir í sinum málflutningi. Í fyrru greininini brúkar hann grundsetningin um nyttuloysi. Tað er til fánýtis at royna at fáa føroyskt inn um kirkjugátt, forðingarnar so nógvar. Í seinnu greinini týðar hann til annan og triðja grundsetning. At ætla sær føroyskt sum kirkjumál fer í fyrsta lagi og eftir øllum líkindum at enda øðrvísi enn tjóðskaparfólk ætla, tað fer ikki at menna trúarlívið í oyggjunum, men tvørturímóti at beina tað út á eina oyðigøtu hagar, ið andligur deyði og grøv bíða.

Í øðrum lagi er føroyskt kirkjumál ein vanlukka í øllum førum.

V.ø.o. Emil Bruun doyr frá øllum samhuga við føroyskan tjóðskap og fær lív aftur í endurnýggjaðari trúgv upp á danskt og hitt óskerda, danska eindarríki.

### Friðrik Petersen: Eitt hamskifti

Orðbragd av samlíkum slag sum hjá Havnarpresti er í ymsum greinum í Dimmalætting, t.e. ritstjórnargreinum, og kemur so við og við til sjóndar eisini í tí, sum Friðrikur Petersen skrivar um kirkju- og skúlamálsspurningin.

Tað hevur verið mongum tilevni til undran, tað áskoðanarliga hamskiftið Friðrik Petersen sýnist at fara ígjøgnum í tjóðskapartíðini. Í *Móðurmál stórt er títt fall,* yrkt átjanhundrað og sex og hálvfjers, er hann við til at birta upp í tjóðskaparkensluna, men í árunum um og eftir aldarskiftið er hann ein av teimum, ið stendur fastast ímóti, at føroyskt fær innivist í kirkju og skúla. Men slík undran man helst standast av, at tjóðskapar- ella føroyingafelagstíðin í Føroyum verður skoðað úr einum ov lítið víðum sjónarhorni, so bert tann føroyski pallurin er í ljósmála, annað, eitt nú tann danska víddin, fellur líkasum í døkkan. Veruleikin var tó, sum fyrr nevnt, at tað sum fyrifórst í Føroyum tey árini, var nærbundið at stjórnmálasorðaskiftinum í Danmark. Meginbrotrivan, sum gekk har, ið fólkaræðið og andstøðan móti tí skúraðu hvørt móti øðrum, skoraði seg langt inn í føroyskt tilvit eisini. Hans Jacob Debes skrivar í *Nú er tann stundin...* um Friðrik Petersen, at hann var ein maður „við øllum konservativum eyðkennum". Íðan hvat er so lógið við tí, meðni, at ein maður við „øllum konservativum eyðkennum" í seinnu helvt av nítjandu øld vildi andøva móti einum ráki í samtíðini, sum bar at fólkaræði. Í donskum afturhaldshuga tá á døgum var fólkaræði óðamannaverk eins og viðurskiftini vóru, samfeløg í skjótari broyting enn eygað og vit evnaðu at skilja, gomul hevd og viðtikin virði skrædd úr skonkum, upploysing, evnaloysi og óskil fløddi at innan- sum uttanlands. Tað vit vita var Friðrik Petersen longu í studentaskúlaárum sínum í Reykjavík farin at ivast í, um rætt var at gera tjóðskap um til politisk krøv um sjálvræði. Sum árini gingu og stríðið um fólkaræðið í Danmark harðnaði, vaks hesin ivin í Friðriki Petersen og fekk hann at enda heilt at venda tjóðskaparrørsluni baki.

Samanumtikið vóru tað sostatt karmarnir um donsk stjórnmál og orðaskiftið um fólkaræðið í Danmark, sum í stóran mun skaptu móðurmálsumrøðuni í Føroyum tað orðbragd, hon fekk, tað sama hjá teimum, ið vóru fyri føroyskari málreising, sum hjá teimum, ið vóru ímóti.

### Veking og málstevna

Vit fara nú fram í tjúguni, í triðja tíðarskeiðið, sum her er til viðgerðar. Tey árini, meðan politiska skipanin í løgtinginum, sambandið og sjálvstýrið, skorðar seg sjálva fastari og fastari í endaleysum munnsjabbi um málspurningin (og ger tað heilt fram til 1938), hendir eitt, frøðiliga yvirhøvur lítið eftirgáað, men kortini avgerðandi umskifti í Føroyum, eitt umskifti, sum kom at ávirka føroyskt máltilvit og orðbragdið í umrøðuni um málið í eftirtíðini.

Hetta umskiftið er tað frambrot, ið

Sosialurin